# Ókeypis bøkur á netinum




**Mánamorgunin læt danska forlagið Onlibri ein bókahandil upp á internetinum, har tú ókeypis kanst taka bøkur niður sum PDF fílur.**

MENTAN
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni eru ymiskar yrkisbøkur at finna, sum venda sær til vanliga borgaran. Bøkurnar hava heiti sum »Bilkøb for alle«, »Guide til pensionsopsparing« og »Mad til mange«.

Bøkurnar eru ókeypis fyri brúkaran, hetta kann lata seg gera, tí lýsingar inni á heimasíðuni og í bókunum fíggja forlagið.

Hugskotið til hetta forlagið kom frá prentandi forløgum, sum eru farin at leggja bøkur út á netið sum ljóðbøkur og PDF fílur. Og frá teimum ókeypis tíðindabløðunum, ið eru vorðin sera væl umtókt í Danmark.

– Vit halda, at ókeypis bøkur á internetinum eru framtíðin, sigur Andreas Rasmussen, verkætlanarleiðari.

Ókeypis bøkur eru fyrr gjørdar til smáar málbólkar, men Onlibri er fyrsta forlag í heiminum, sum útgevur ókeypis bøkur, ið venda sær til almenningin.

– Orsøkin til, at vit hava valt yrkisbøkur, er, at tær egna seg sera væl í PDF formati, tí møguleiki er at søkja eftir einum ávísum orði í fíluni.

Allar bøkurnar hjá Onlibri eru skrivaðar til forlagið, og høvundarnir fáa løn, á sama hátt, sum um bókin var útgivin á einum prentandi forlagi.

Forlagið ynskir at hava eitt gott samskifti við lesararnar, sum hava møguleika at fara inn á heimasíðuna, og skriva teldupost til forlagið, við uppskotum um evni til nýggjar bøkur.

– Vit leita eftir skikkaðum rithøvundum, at skriva bøkur til okkara. Vit royna at finna rithøvundar úr øllum landinum, og vit kundu eisini hugsað okkum at fingið nakrar úr Føroyum, sigur Andreas Rasmussen.

Á síðuni kunnu øll taka bøkurnar niður, uttan at skráseta seg sum brúkara frammanundan. Beint áðrenn bókin verður tikin niður, verður spurt eftir postnummari, her virkar eisini at skriva føroysk postnummur.

Danskararnir tóku væl ímóti hesum nýggja forlagnum, tað fyrsta døgnið vórðu 21.731 bøkur tiknar niður.

# Náttarravnar í Eysturoynna

**Fríggjakvøldið fara Náttarravnarnir úr Tórshavn at hava ein fund í fimleikahøllini í skúlanum á Glyvrum við ætlan um at seta eitt lið av Náttarravnum á stovn í Eysturoynni.**

BØRN OG UNG
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Náttarravnar eru vaksin fólk, oftast foreldur, sum sjálvboðin ganga úti um næturnar í vikuskiftunum, so tey ungu skulu kenna seg trygg, tá tey eru í býnum.

- Tey ungu sakna okkum í býarlívinum í Eysturoynni, sigur Ásvør Højgaard, formaður í Náttarravnunum í Tórshavnar kommunu.

Tað eru foreldur úr Runavík, sum hava vent sær til Náttarravnarnar í Havn, við einum ynski um at fáa ein bólk av Náttarravnum upp á beinini í Eysturoynni.

- Vit vóna at gera eitt nýtt lið í Eysturoynni, so tey kunnu vera úti, til dømis tá dansur er á Kambsdali ella í Mentunarhúsinum, greiðir Ásvør Højgaard frá.

- Men vit vóna eisini at kunna samstarva soleiðis, at tey kunnu koma til Havnar at hjálpa okkum, og soleiðis at nøkur av okkum kunnu vera úti við teimum í Eysturoynni.

Á fundinum verður formaðurin úr donsku Náttarravnunum Erik Torsted við. Hann fer at greiða frá um virksemið hjá Náttarravnunum og um grundarlagið fyri, hví tey ganga úti í býnum.

Løgreglan fer at greiða frá um býarlívið og um, hvussu Náttarravnarnir hava gjørt mun, tey fýra árini tey hava verið í Tórshavn.

Við á fundinum vera eisini norðmaðurin Erik Brekke, sum upprunaliga stovnaði Náttarravnarnar og ein donsk kvinna, ið eitur Lene Risberg, fer at greiða frá hvussu ecstasy misbrúk hevur oyðilagt hennara lív.



# Ungur maður doyði á motorsúkklu

FERÐSLUVANLUKKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið hendi ein syndarlig ferðsluvanlukka stutt uttan fyri bygdarskeltið í Fuglafirði. Vanlukkan kostaði einum 26 ára gomlum manni í Fuglafirði lívið.

Løgreglan í Havn heldur, at maðurin, sum var á veg á motorsúkklu til Fuglafjarðar, av eini ella aðrari orsøk kom út í grúsið við síðuna av sjálvari vegbreytini og misti tamarhaldið á súkkluni.

Maðurin slongdist móti bilverjuni og endaði niðri í bønum.

Sjúkrabilur og kommunulækni komu á staðið, men ungi maðurin doyði, áðrenn hann kom á sjúkrahús.




*Tað er sorg, nú ein ungur maður er deyður í ferðsluvanlukku*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Druknaður á Havnarvág

**Í morgun sóu fólk umborð á strandfaraskipinum, Rituni, ein deyðan mann, sum fleyt í sjónum á Havnarvág**

DEYÐSFALL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var klokkan 08.43 í morgun, at løgreglan í Havn fekk boð um, at fólk umborð á strandfaraskipinum, Rituni, sóu ein deyðan mann, sum fleyt í sjónum útfyri Tinganesi.

Løgreglan sigur, at maðurin fleyt við reyðu boyuna, sum liggur suður úr Tinganesi.

- Sum eg havi skilt, fingu teir umborð á Rituni sett fast á mannin, og tað vóru fólk hjá Tórshavnar Sløkkiliði, sum tóku hann upp.

Løgreglan sigur, at maðurin, sum er 56 ára gamalur og er úr Havn, ikki hevur verið eftirlýstur, nú hann varð funnin deyður.

-Líksýn verður, og møguliga verður líkið kannað, men alt bendir á, at maðurin onkusvegna er dottin á sjógv og er druknaður. Í løtuni vita vit ikki meira at siga um vanlukkuna, sigur vakthavandi.




**Starvsfólk aftaná skúlatíð til Baresso Coffee**

SMS letur upp nýggja Baresso café 25. oktober, og í tí samband søkja vit álítandi fólk til caféina. Gongur tú í skúla, hevur tú møguleika at søkja um arbeiði hjá okkum. Starvið verður sett frá 18. oktober 2006.

Arbeiðsuppgávur: At gera reint og rudda har gestirnir sita • At tryggja at uppgávur viðvíkjandi reingerð og annað, sum er neyðugt, verður gjørt • At gera kaffistovuna reina eftir afturlatingartíð og annars gera klárt til dagin eftir • Tilgerð og borðreiðing av okkara sermerktu kaffisløgum, køkum, tvíflísum og øðrum matvørum • Geva gestum góðar upplivingar við einum smíli.

Vit vænta av tær: At tú ert ágrýtin • Tú dugir at halda kaffistovuna reina og nossliga, tí hetta hevur stóran týdning fyri, at okkara gestir føla seg væl • Tú hevur eitt vinnandi smíl og ert í góðum hýri, so onnur gleðast við tær • Tú dugir væl at samstarva • Tær dámar at gleða onnur við tínum ágrýtni. Hevur tú spurningar viðvíkjandi arbeiðinum, kanst tú ringja til Anju á tel 210990.

baresso COFFEE

SEND UMSÓKN TIL : BARESSO • SMS • Á TRAPPUTRØÐNI • POSTBOKS 1059 • 110 TÓRSHAVN